Tann loynda styrkin

Lívførið í føroyskari mentan við atliti til sjálvstýrismenningina í nýggjari tíð og til lagnuna hjá øðrum atlantstjóðum

Fyribils samandráttur: tann loynda megin í føroyskari mentan í hjálandatíðini. Javnstøða, tvímæli og tvímentan. Føroysk sjálvstýrismenning í 19. og 20. øld samanborin við íslendska politiska menning um somu tíð. Heimastýrislógin sum speglmynd av verandi fyritreytum. Annar partur av fyrilestri, sum Hanus Kamban helt á landsfundi Javnarfloksins

Eftir Hanus Kamban
Annar partur

Tvímæli og javnstøða

Men hetta, at við politiskum og búskaparligum trýsti uttanífrá fylgir mentunarlig skapan, evnað til sum skaldskapur á móðurmálinum, er bara ein táttur í føroyskari mentunarsøgu.

Tí førka við okkum nakað frameftir, so koma Føroyar í 1387 undir danskt vald. Sambandið við Noreg heldur fram í meira enn tvær øldir aftrat, men í árunum 1619-20 verða Føroyar handilsliga og kirkjuliga knýttar at Keypmannahavn og Sælandi. Við trúbótini o.u. 1540 verður danskt til kirkjumál í Føroyum, og soleiðis verða, sum ein avleiðing eisini av tí nýggja prentkynstrinum, danskir sálmar og danskar lestrarbøkur bornar inn í føroyska andaliga mentan. Sálmarnir hjá danska skaldinum Thomas Kingo (1634-1703) og norska yrkjaranum Petter Dass (1614-1708) verða hvørs mans ogn í Føroyum. Við vísubókunum hjá Anders Sørensen Vedel (1591) og Peder Syv (1695) fáa føringar høvi til at ogna sær og læra seg danskar fólkavísur.

Og her, yvir av, kunnu vit kanska siga, danskari mentunarligari og hjálandapolitiskari ávirkan, velja føringar at svara upp á avbjóðingina uttanífrá á nýggjan hátt. Teir læra, ella noyðast at læra, tað fremmanda málið, og meira enn tað, teir taka ímóti tí útlendska mentunarfarminum, á útlendskum máli, og geva honum, fólkaligir sum teir eru, sess á sínum bríkum undir liðini á teirra nú heimligu mentan.

Støðan er nú tann, at kirkjumálið er danskt, bókmentamálið er føroyskt og danskt, meðan gerandisdagsins mál alt sum tað er er føroyskt. Tað áhugaverda í hesi støðu er, at millum móðurmálið og tað innflutta málið er javnstøða, tó so at móðurmálið samstundis hevur greiða yvirvág sum gerandisdagsins, kvæðanna, sagnanna og ævintýranna mál.

Hjálandapolitisk ávirkan kann, alt eftir hvussu hon artar seg, og hvat mótspæl hon fær, gerast annaðhvørt ein vanlukka ella, í summum førum, eitt innsig av ríkandi slag. Í Hetlandi og Orknoyum hendi tað, at tann innlendska, norrøna mentanin - av tí at fólkið har varð búskaparliga útpínt og mentunarliga niðurtraðkað - syndraðist. Tað norrøna málið mátti dvína fyri enskum, og aðrir siðir, eitt nú kvøðing og dansur, máttu lúta fyri eitt nú skotskari puritanismu.

Heilt øðrvísi var gongdin í Føroyum. Føroyskt gjørdist ikki kirkjumál í Føroyum, og søguligar og mentunarligar atvoldir høvdu við sær, at bíblian ikki var týdd til føroyskt, eins og heldur eingin bók á føroyskum var til um hetta mundið. Fyrsta føroyska bókin kom sum kunnugt ikki út fyrr enn í 1822.

Men av tí at føroyskt hóast hetta megnaði at standa tí útlendska málinum kurl, so at javnstøða var málanna millum, gjørdust føringar tvímæltir, og fingu samstundis - sum kanska einasta tjóð í Norðurlondum umframt danir - atgongd til tann ríka danska vísuskaldskapin. Eftir hetta vóru sostatt - fyri at nevna tvey dømir - bæði tey føroysku Sjúrðarkvæðini og tær donsku vísurnar um drotningina Dagmar andalig ogn hjá føringum. Mentunarsøguliga er hetta ein merkisverd gongd, sum í stuttum hevur við sær, at ein lítil tjóð ognast bæði tvímæli og tvímentan.

Ósjónligt lívsføri

Tá ið eg havi valt at lýsa hesi viðurskiftir við einum slíkum mentunarsøguligum uppkasti, so er tað ikki bara tí at henda myndin er áhugaverd - sum eg haldi hon er - men eisini tí at ætlanin er seinni at lata mentunarsøgu og nútíðar politiskar og ríkisrættarligar spurningar umskarast og, harumframt, á hesum baksýni royna at lýsa tað framtíðarútlit, vit sigga ella ynskja okkum, mentunarliga.

Men allarfyrst fari eg at royna at gera eina niðurstøðu burtur úr tí, sum higartil er borið fram. Vit ansa nú fyrst eftir, at føroysk mentan er munnlig og ikki - sum, í stóran mun, tann íslendska - skrivlig. Meðan íslendingar tíðliga í tíðini hava eitt skriftmál, eiga skrivað handrit, og við prentkunstinum fara at geva bøkur út, eitt nú, longu í 1584, alla bíbliuna í týðing til íslendskt, livir føroysk kvæða- og frásagnarmentan á manna tungu og bara har.

Men av tí at henda mentan er munnlig, er hon eisini ósjónlig, og hetta er tað næsta eyðkennið, vit varnast. Norðmenn valda í Føroyum, danir valda í Føroyum, embætismenn koma í 16. og 17. øld, handilsforvaltari, fúti, kommandantur, danskir prestar setast á prestagarðar víða um í landinum, men føringar halda fram, sum rein einki av hesum við teir, at kvøða, fortelja, dansa og arbeiða - og brúka sítt egna mál.

Og tí mugu vit leggja aftrat, at henda ósjónliga, leingi munnliga, mentanin hevur enn eitt eyðkenni: styrki, seiggi. Kanska er mótstøðuføri - resistensur - eitt neyvari heiti fyri hetta seinasta eyðkennið. Og hetta er, um vit hava lagnuna hjá Hetlandi og Orknoyum í huga, bæði merkisvert og ómetaliga týdningarmikið.

Tey politisku prøvtølini

Roynt hevur verið her at gera eitt slag av eftirmeting av føringa mentunarliga avriki, soleiðis sum tað kemur til sjóndar á sjey alda baksýni. Um vit nú fara frá mentan til politikk, og serstakliga hyggja at gongdini í 20. øld, er so ikki grund til at halda, at tjóðarinnar atfinnarar hava havt rætt?

Hjá íslendingum birtist ein tjóðskaparrørsla longu tíðliga í 19. øld, hjá føringum ikki fyrr enn hálva øld seinni. Tá ið Ísland gekk saman við Danmark í persónssamveldi (í 1918), var tað í roynd og veru eitt fullveldi, sum enntá eisini, í verki, ráddi yvir sínum uttanríkismálum. Um sama mundið var Føroya Løgting enn bara ein ráðgevandi stovnur. Íslendingar skipaðu eitt sjálvstøðugt tjóðveldi í 1944. Fýra ár seinni fingu føringar sítt heimastýri, og tá lógu enn partar av okkara lóggevandi, útinnandi og dømandi valdi eftir í Danmark.

Samanbering við Ísland

Til hetta er at siga, at ein spurningur er, um tað er skynsamt at gera nakað tjóðarskotsmál burtur úr slíkum samanburðum. Tí so líkir føringar og íslendingar eru, eitt nú málsliga, og kanska eisini í lyndi, so eru eisini stórir munir, eitt nú søguliga og landafrøðiliga, sum kanska gera eina eintýdda analogi millum hesi lond ivasama.

Eitt nú kann verða fort fram, at tá ið Ísland og Føroyar í 1260´árunum blivu norsk atlond, gluppu bæði lóg (um Seyðabrævið er undantikið) og lóggávuvald føringum av hendi. Íslendingar fingu hinvegin sína egnu lógbók - Jónsbók - sum eftir íslendskum krøvum varð endurskoðað tvær ferðir. Eisini fingu teir ásett, at lógir og lógarboð frá Noregs kongi skuldu samtykkjast av tí íslendsku løgrættuni, áðrenn tær komu í gildi. So meðan føroyska tingið misti sítt lóggávuvald, hevði íslendska altingið framvegis, saman við Noregs kongi, lut í lóggávuvaldinum í Íslandi.

Hyggja vit at mentanini, so varðveitti Ísland sítt skriftmál, og við siðaskiftinum gjørdist íslendskt kirkjumál í Íslandi. Longu í 1540 kom Nýggja Testamenti, í týðing eftir Odd Gottskálksson, út á íslendskum. Um hetta mundið átti Ísland bæði fornan skaldskap og miðaldarbókmentir, til skjals í skrivaðum handritum, og í tíðini aftaná komu prentaðar bókmentir út. Biskupssetrini á Skálholti og Hólum hildu fram eisini eftir trúbótina, og skúlaskapur, bókaútgáva og bókmentir blómaðu. Guðbrandur Þorláksson, sum gav bíbliuna út í íslendskari týðing í 1584, gav tilsamans út 90 bøkur. Onnur andsmenni vóru Arngrímur Jónsson (1568-1648), rithøvundur og søgufrøðingur, og sálmaskaldið Hallgrímur Pétursson (1614-84).

Aftrat hesum kemur, at íslendingar sum heild tykjast at hava fingið munandi harðari viðferð frá donskum myndugleikum enn føringar. Tað at Jón Arason, seinasti katólski biskupur á Hólum, og tveir av synum hansara vóru hálshøgdir uttan lóg og dóm í 1550, gav íslendska fólkinum beisk minnir, sum ivaleyst stuðlaðu til teirra frælsishug seinni.

Umframt hetta eiga vit helst ikki at gloyma, at føringa aldalanga samband við Danmark, saman við tí avmarkaðu fólkanøgdini í Føroyum, hevur skapt eina mentunarliga og ættarliga umskaran, sum helst er størri enn tað dansk-íslendska sambandið. Ikki minni týdning enn søga og mentan hava landafrøðiligir og vinnuligir munir, eitt nú tað at Ísland í vídd er meira enn tvær ferðir so stórt sum Danmark og meira enn 70 ferðir størri enn Føroyar.

Politikkur sum seglmynd av verandi fyritreytum

Ein kann, um ein hoyrir til fullveldisvongin í føroyskum politikki, bæði undrast á og ilskast um seinføríð í føroyskari sjálvstýrismenning, fyri ikki at tala um tey løgnu bakkast, sum hava verið. Eitt gott dømi um eitt slíkt bakkast er grein 7, sum kom í gildi fyri Føroyar í 1912 eftir ynski frá einum meiriluta á Føroya Løgtingi, og sum beyð, at kenslumálið í Føroyum var danskt (við tí uppískoyti, at føroyskt kundi nýtast sum hjálparmál í teimum lægru flokkunum).

Tá ið hetta er sagt, slepst samstundis illa undan tí viðurkenning, at føroysk sjálvstýrismenning, hennara vingluta, trilvandi, seinføra stev, speglar aftur okkara serligu landafrøðiligu, vinnuligu, búskaparligu og mentunarligu fyritreytir. Vit taka ikki loysing við einum kasti, helst tí at vit - við hesum serligu fyritreytum í okkara medviti - ikki hætta okkum at gera tað. Og kanska taka vit als ikki loysing, men finna eitt annað modell, okkara serliga veg. Ein slík tilgongd kann tykjast dirvisleys, men kanska kann ein onnur samanbering ella analogi fórast fram í hesum sambandi.

Samanbering við Danmark

Í Danmark hevur í 20. øld verið ein áhaldandi togan millum politikarar, sum - við atliti til teirra sterka granna sunnan fyri markið - hildu fast um tjóðarfrælsi og stoltleika og kravdu at hava eina sterka verju, og hinvegin aðrar politikarar, sum - hóast eisini teir vóru tjóðskaparligir - mæltu til verjupolitiskt varsemi og mæltu til at hava eina uttanpartatøðu í krígstíð, fyri ikki at øsa grannan til at traðka teirra lítla, veika flatland sundur í molar.

Hesin at vísa seg undirbrotligi politikkur, hvørs undirstøði var ábyrgdarkensla og ein næstan listilærd skynsemisstýrd ella rationell strategi, førdi, handfarin av politikarum sum P. Munch og Erik Scavenius, Danmark óskalað at kalla ígjøgnum tveir heimsbardagar. Her eigur kortini at verða nevnt, at eins og Danmark hevði brúk fyri realpolitiskari strategi, hevði tað so sanniliga eisini, undir 2. heimsbardaga, tá landið var hersett av týskinum, brúk fyri mótstøðurørsluni. Sum søgufrøðingurin Bo Lidegaard ger vart við í 4. bindi av Danmarkar uttanríkispolitisku søgu, sum kom fyri stuttum, hevði realpolitikkur uttan mótstøðurørslu verið ein vanlukka.

Um vit nú hyggja at føroyskum politikki í 20. øld, og kanska serliga Heimastýrislógini, so ber eftir mínum tykki til at gera eina samanbering. Tí eins og Danmark noyddist at evna sín politikk til við atliti til sín sterka suðurgranna, hava vit føringar noyðst at hugsa um okkara høvuðshjall, ið sum kunnugt framvegis bara er ein og er á sjónum og er undirlagdur umskiftum av eitt nú marknaðar- og vistfrøðiligum slag, sum vit ikki, ella bara í lítlan mun, hava ræði á.

Heimastýrislógin kann fatast sum eitt politiskt framstig av pragmatiskum slag, ícomið og framt út frá verandi fyritreytum. Vóru Føroyar eitt størri land við ríkari og fjølbroyttari tilfeingi, høvdu vit kanska havt fingið loysing í 1948. Undir verri umstøðum høvdu vit einki fingið. Vit fingu ikki alt, sum summi høvdu vónað og ætlað, men vit fingu so sanniliga heldur ikki einki. Tey ítøkiligu úrslitini vóru, at lóggávuvald og útinnandi vald - sum Føroyar høvdu havt, de facto og lutvís, síðan 1940 - nú í nógv størri vídd, og formliga, vórðu flutt aftur til Føroya. Hetta gav okkum tíð og umstøður til at byggja upp og búgva til eina politiska og umsitingarliga menning.

Ikki minni týdning hevði tað, at Føroyar, takkað veri búskaparligum samstarvi við sítt gamla hjálandaveldi, fingu møguleika at menna tann sosiala partin av samfelagsheildini. Hetta, tað samanhald og tann styrki, sum eitt samfelag ognast av tí at tess borgarar føla, at teir hava myndugleikar, sum taka ábyrgd av teimum, verður mangan undirmett. Men sosialur politikkur og mentunarpolitikkur eiga, um teir verða handfarnir rætt, meira styrki enn "hjálmar" og "lúðraljóð".

Tann ósjónliga styrkin. Dansur og kvøðing í miðøld og seinni gjørdust – saman við øðrum táttum í roykstovumentanini – støðið undir nútíðarpolitiskari menning



Biblian, sum Guðbrandur Þorláksson gav út í 1584, nevnd Guðbrandsbíblian

P. Munch og Erik Scavenius, sum - meira enn aðrir danskir politikarar - skaptu danskan uttanríkispolitikk árini 1914-45